*Holger Lavesen, fyrisitingarstjóri í DONG:*

# –Vit luttaka í leiting við Føroyar á jøvnum føti við onnur feløg



*Holger Lavesen, fyrisitingar stjóri hjá DONG*

*–Hetta stendur fast, og tað eru við nøgdir við. Tað hava vit heldur einki ynski um at broyta sigur fyrisitiligarligi stjórin í DONG, Holger Lavesen við Sosialin í sambandi við tað nógv umrødda notatið um føroysku undirgrundina*

JAN MÜLLER

Í nógv umrødda notatinum frá danska orkumálaráðnum til Føroyabólkin frá 19. apríl 1994 „Notat vedrørende forslag til, hvordan et dansk-færøsk selskab kan etableres" verða donsku oljufeløgini DONG og DOPAS nevnd í fleiri støðum.

Í notatinum stendur m.a., at tað føroyskt-danska felagið, sum ætlanin er at stovna, skal ikki sjálvt byggja upp nakra umsiting. Ístaðin skal ein umsitingar avtala gerast við DONG og tess dótturfelag DOPAS.

Í notatinum verður oftani sipað til hesi bæði feløgini, sum - um ætlanin gerst veruleiki - fáa nærum eink arrætt til ein oljuutvikling við Føroyar.

Vit hava spurt stjóran í DONG, Holger Lavesen, í hvussu stóran mun DONG og DOPAS hava verið við í fyrireikingunum og orðingunum av umrødda notati, og um ikki eitt slíkt notat setir hesi bæði feløgini í eina ringa støðu mótvegis bæði føroyskum myndugleikum og so eisini altjóða oljuídnaðinum, sum hesi feløg skulu arbeiða saman við!

### Virka út frá handilsligum fyritreytum

Holger Lavesen: -Lat meg fyrst gera heilt greitt, at DONG luttekur í leitingini eftir olju og gassi við Føroyar út frá kommerciellum fyritreytum.

Eg kann so eisini upplýsa, at vit í DONG eru vitandi um, at Umhvørvis- og Orkumálaráðið á heysti í 1993 og á vári í 1994 metti um ymisk modell fyri eitt møguligt samstarv millum Føroyar og Danmark um leiting eftir olju og gassi.

Sum partur av hesum metingum spurdi Orkumálaráðið DONG um møguleikarnar fyri at kunna gera brúk av royndunum hjá DONG og somuleiðis tess fakligu ekspertisu í sambandi við ráðgeving fyri føroyska landsstýrið í tilrættaleggingini av framtíðar leiting í føroysku undirgrundini.

-Hesar metingar førdu mær vitandi ikki til nakað ítøkiligt úrslit sigur Holger Lavesen.

Hann vísir annars á, at nevndin í DONG í oktober mánað 1994 samtykti, at dótturfelagið „Dansk Olie- og Gasproduktions A/S (Dopas) kundi fara í samstarv - útfrá vanligum handilsligum fyritreytum - við onnur altjóða oljufeløg at fyrireika seg til eina møguliga leiting við Føroyar.

Henda avgerð varð seinni góðkend av ognaranum av DONG, orkumálaráðharranum. Síðani er Dopas farið uppí eitt samstarv við Amerada Hess, Lasmo og Norsk Hydro.

Tvs. at luttøkan hjá DONG í leitingini við Føroyar er á jøvnum føti við onnur feløg. Tað stendur fast, tað eru vit nøgdir við, og einki ynski hevur verið frammi um at broyta hetta sigur Holger Lavesen, umsitingarligur stjóri hjá DONG við Sosialin.

Sosialurin – brúka okkum, tá tú brúkar teg!

## Uffe Elleman-Jensen á Føroyavitjan



Í dag kemur Uffe Elleman-Jensen, formaður í danska Vinstraflokkinum, á vitjan hjá Sambandsflokkinum, sum hevur landsfund í vikuskiftinum.

Fríggjakvøldið kl. 19.30 fer hann at halda almennan fyrilestur í læraraskúlahøllini, har evnið verður »De små nationers fremtid«. Aftaná verður møguligt at seta spurningar.

Fyrrapartin leygardagin fer hann at vitja ymsastaðni í Streymoynni. Seinnapartin kl. 15.30 hevur hann so tíðindafund í bygdarhúsinum í Kollafirði í sambandi við landsfundin hjá Sambandsflokkinum. Á landsfundinum skal hann eisini halda røðu, og somuleiðis á veitsluni seinni.

Sunnudagin fer Uffe Elleman-Jensen so avstað aftur til Danmarkar.

**Ringið!**
**– og vit skriva**
**11820**


## Ull og Magnet
# SEINGJARKLÆÐI

Hava tygum pínu, sár ella sjúku av ymiskum slag og ynskja tygum linna fyri hetta, so hava vit møguliga júst loysnina á tínum trupulleikum.

Heimskendu ull- og magnet-seingjarteppini eru nú at fáa eisini í Føroyum. Ullin er av geitarlombum í Tibet fjøllunum (minnir nógv um føroysku ullina), og magnetirnar koma av elektriskum bylgjum í teppinum.

Hesi teppi kunnu eftir stuttari tíð linna ella heilt taka burtur tygara pínu, umframt at tey eru behagilig at liggja á. Royndir aðrastaðni hava víst, at teppini m.a. hava hjálpt sjúklingum við: gikt, bruna, astma, allergi, diskusprolaps, sárum á kroppinum, magapínu, ryggpínu, feilum í nervalagnum o.a. Dømi um virkningin sæst niðanfyri.

Ull og magnetir fáast eisini í dýnum, koddum, betrekkum til bilsetur, undirklæðum v.m.

Er hetta nakað fyri tygum, so vendið tygum til

**Petur Sørensen, tlf./fax 13892** ella
**Vinjard Joensen, tlf./fax 13606/84074**

**De stærke smerter forsvandt**

*Ely Hansen, Brændeskovvænget 9, 5700 Svendborg, tlf.: 62 21 63 10:*
Mange år med stærke smerter fra venstre hofte, ned over venstre balle og helt ned til storetåen. Gigtsmerter i hænderne. Store knuder over lænden og ned over baglåret. Om natten søvnproblemer på grund af smerter og kramper. En mave der altid gjorde vrøvl på grund av gigtmedicin. Sådan var de lidelser, som Ely Hansen fra Svendborg døjede med, indtil hun i 1987 købte sig et sæt sengetøj hos Humanitas.

– Om det har hjulpet mig – det er slet ikke ordet. Min mave er helt i orden igen. Knuderne over lænd og lår er næsten helt glattet ud og smerter ikke mere. Gigtsmerterne i hænderne er aftaget så meget, at jeg igen kan vride en klud – uden det gør ondt. Alle smerter i benene er væk, og jeg sover igennem hver nat uden at vågne én enste gang. På intet tidspunkt efter anskaffelsen af magnetsengetøjet har jeg taget smertestillende medicin, og mit sengetøj virker stadig som det skal.